# NÓGVUR GÓÐUR TÓNLEIKUR TIL PLANET-KVØLDIÐ

Umframt handanin av teimum ymsu heiðurslønunum til tónleikarar, fara eisini fleiri bólkar og einstaklingar at hava framførslur til stóra Planet gallakvøldið á Hotel Føroyum.

Tað verður eitt bland av ymsum tónleikastílum, nýggir og eldri bólkar, sum fara at spæla hetta kvøldið.
Tað verður friðarligur tónleikur við Brandi Karlsson Jacobsen, og tað verður tað reina anarki við punkbólkinum 200. Og millum alt hetta fara eisini nøvn sum Kári Sverisson, Frændur og Petsi Tvørfoss at spæla.
Tað verður ein livandi kvøld við nakað av tí besta, sum føroyskur tónleikur hevur at bjóða.

## BRANDUR KARLSON JACOBSEN



Í nógv ár hoyrdist lítið til tónleikaran Brand Karlson Jacobsen. Men hann kom afturíaftur í singer/songwriter kappingini á Hafnia Lounge í fjør og vann hesa kapping. Nú er hann tilnevndur sum besti sangari til Planet-heiðurslønirnar

30 ára gamli Brandur Karlson Jacobsen var við í bólkinum Ikaros í 90´unum, men seinnu árini hevur hann verið lítið og einki frammi við tónleiki.

– Eg havi fyri tað mesta bara spælt heima, sigur hann.

Nú er hann ein av teimum, sum er tilnevndur sum besti sangari til Planet-heiðurslønirnar, og hann spælir eisini á Planet gallakvøldinum.

## TERJI RASMUSSEN



Terji og Føstufressar góvu fyrst í 90'árunum kanska bestu føroysku fløguna nakrantíð út, henda fløga er ongantíð givin við at selja. Hóast fløgan einki beinleiðis hitt hevði, so eru mest sum øll løgini vorðin fólkaogn. Á Planet Awards fer Terji at undirhalda við nøkrum av hesum nýtímans tónleikaklassikarum.

Terji er mr. Entertainment og hevur ótrúligar gávir til at fáa fólkið við, hetta er óansæð um talan er um Terja við kassagittara ella við stórum bólki. Hetta hevur hann víst, sum einstaklingur, í Moirae, Føstufressum og Frændum.

Serliga og egna røddin er vorðin ein partur av føroysku fólkasálini. Tað er eingin ivi um, at Terji gevur tí spennandi skránni á Planet Awards eina fólkaliga síðu. Syngið við góðskan er í øllum førum høg.